ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 18. februar 2010

# Vann gull fyri krabbameins-raktan bróður

## Í Svøríki er frøin stór um OL-gullið hjá Bjørn Ferry, sum hann vann í skíðskjóting




Heri Simonsen

Stutt undan, at Bjørn Ferry sera óvæntað vann OL-gull í skíðskjóting, fekk hann eini sms-boð frá bróðuri sínum, Anders Ferry sum er raktur av krabbameini.

Anders Ferry var tá staddur í einum sjúkra húsi í tí belgiska býnum, Leuven. Anders Ferry hevði júst tá prátað við læknarnar, og teir høvdu góð tíðindi at bera honum.

- Bjørn bróðir gjørdist ovurfegin, tá vit góvu honum tey gleðiligu boðini. Betri fyrireiking til OL-kappingina í skíðskjóting kundi hann ikki ynskt sær, segði Anders Ferry við svenska blaðið, Expressen.

Við Expressen sigur Bjørn Ferry:

- Eg vann OL-gullið fyri Anders bróðir, men tað er mangan týdningarmiklari og størri, at hann yvirlivir viðgerðina, enn at eg vinni eitt OL-gull.

Anders Ferry hevur eisini fingið viðgerð í Skotlandi, og hevur seinastu tvey árini stríðst við krabbamein. Ì Skotlandi var talan um eina umfatandi skurðviðgerð, har skurðlæknarnir tóku 10 prosent av heilanum hjá Anders Ferry.

Men nú kann nýkosni svenski OL-gullvinnarin fegnast um, at bróðir hansara, Anders er fer við at vinna sítt stríð. Triðji bróðurin, Mathias Ferry er við Anders Ferry í Belgia. Brøðurnir eru sera tætt knýttir, og eru hópin av sms-boðum send millum Belgia og Kanada.

Søgan um Ferry-brøðurnar hevur rørt hvørt hjarta í Svøríki, og mong uttanfyri Svøríki eisini.



Søgan um Bjørn Ferry hevur nomið hjartastreingir kring alt Svøríki



Høgni í Stórustovu og Christian Andreasen skulu kappast um atkvøðurnar, tá forsetaval verður í FSF um góða viku. Harumframt eru eisini fýra valevni til tríggjar nevndarsessir

# Øll nevndin verður skift

## Eingin av teimum trimum vanligu nevndarlimunum, ið standa fyri vali, stilla upp til aðalfundin hjá FSF. Hinvegin verður stríðsval um forsetasessin, har Christian Andreasen tykist hava breiðan stuðul




Jákup Mørk

Enn eina ferð verður stríðsval um forsetasessin í Fótbóltssambandinum, tá aðalfundur verður leygardagin í næstu viku. Hetta gjørdist greitt, tá freistin fyri at stilla upp valevni var úti á midnátt.

Tað hevur ljóðað, at nøkur av feløgunum hava sagt við sitandi forseta, Høgna í Stórustovu, at hann ikki skal rokna við afturvali, men hann hevur so tikið við avbjóðingini, eftir at FC Hoyvík hevur skotið hann upp.

»Var val í dag« plagar at verða tikið til í veljarakanningum. Og var val í dag, so hevði Høgni í Stórustovu neyvan havt nakran møguleika fyri afturvali. Christian Andreasen, sum verður mótvalevni, er nevnliga stillaður upp av 10 feløgunum. Hesi eru Víkingur, KÍ, EB, Streymur, B68, AB, B36, B71 og 07 Vestur. Og so er spurningurin, um EB og Streymur hesa ferð gera brúk av báðum sínum atkvøðum, ella um bert onnur av hesum verður nýtt, soleiðis sum tað hevur verið gjørt áður.

Valið er tó ikki í dag. Tað er 27. februar, og so er spurningurin, um brikkarnir á talvborðinum hava flutt seg til ta tíð. Tað gjørdu teir í øllum førum í 2004, tá Christian Andreasen tóktist hava breiðan meiriluta fyri síni uppstillan. Men breiddin í hesum var tó avmarkað rættiliga nógv, tá atkvøðurnar vórðu taldar upp.

### Alt verður skift

Í løtuni talar ikki nógv fyri, at taktiska borðið verður flutt so øgiliga nógv. Ein partur av avtaluni á formansfundinum seinast í oktober var nevnliga, at øll nevndin skuldi skiftast út.

Leingi var líkt til, at hetta var ein kabala, sum skuldi gerast heldur trupul at fáa at ganga upp, samstundis sum landafrøðiliga samansetingin av nýggju nevndini skuldi fáast í rættlag.

Millum annað vildu klaksvíkingar treyðugt sleppa Rúna Heinesen, men nú er hesin eisini burtur úr kapprenningini, og er Fríðin Ziskason ístaðin stillaður fyri norðasta partin av landinum.

Og heldur eingin av hinum nevndarlimunum, ið standa fyri afturvali, stillar upp. Ein støða, sum Sveinur Tróndarson boðaði frá fyri góðum mánaði síðani, og sum Magnus á Stongum og Rúni Heinesen nú eisini hava tikið – ella hava verið noyddir at taka, tá eitt afturval í dag krevur, at felag skal skjóta viðkomandi nevndarlim upp.

### Semjan verður smíðað

Til teir tríggjar sesirnar eru – umframt Fríðin Ziskaon – Jákup Martin Joensen, Róin Schrøter og Heðin D. Poulsen stillaðir upp.

Víkingur, KÍ, EB, Streymur, B68, AB, B36, B71 og 07 Vestur hava stillað Fríðin og Jákup Martin upp, Rói hevur suðuroyarfeløgini – Royn, TB og FC Suðuroy – sum stillarar, og FC Hoyvík hevur stillað Heðin upp til valið til starvsnevndina.

Býtið í hesum kundi bent á, at Heðin D. Poulsen verður maðurin, ið dregur stytsta stráið. Verður gingið út frá, at landafrøðin fæst upp á pláss, kemur Róin Schrøter inn fyri Suðuroynna. Fríðin Ziskason kemur inn fyri norðasta partin av landinum, og breiða feltið av uppstillarum til Jákup Martin Joensen bendir á, at hann er partur av breiðu semjuni, sum er um at taka skap, men sum enn ikki er smíðað heilt liðug.